gult cyan magenta svart

FM í diskoskasti og spjótkasti

Mikudagin 19 juli skipa›i Bragdi› vegna DSF fyri FM í diskos kasti og spjót kasti. Kappingin fór fram í fagrasta ve›ri á kastivøllinum vi› Eysturskúlan í Tórshavn.

Fyrst var kappast í diskos kast. Hjá kvinnunum vóru einans tveir luttakarar. Men hóast luttakara tali› var líti› so var stø›i› stak høgt. Ingibjørg Poulsen byrja›i kappingina vi› at kasta 25,32 m, og var ta› persónligt met. Randi setti eisini persónligt met vi› 19,48 m. Men í fimta umfari vísti Ingibjørg at hon kann meir enn at stoyta kúlu. Tá kasta›i hon diskin út á 29,52 m og er ta› n‡tt føroyskt met. Ta› gamla meti› átti› Magna Thomassen úr Sandavági, og var ta› sett í 1989 ta› var 26,84 m.

Hjá monnunum vóru 3 luttakarar. Harafturat royndi tann 15 ára gamli Jákup Andrias Thomsen seg. Hann kasta›i vi› tí diskos, sum 15-16 ára gamlir kasta vi› (1,5 kg) og var sostatt ikki vi› í kappingini um FM. Hann tveitti 18,84 m og er ta› føroyskt met fyri 15-16 ára gamlar dreingir. Tveir gamlir kenningar royndu seg í hesi tekniskt torføru grein, nevniliga Heri Ziska, sum eigur ta› Føroyska meti› og Poul Guttesen sum hevur tiki› seg nógy fram hetta seinasta ári›. Óvænta›ur spenningur bleiv um úrsliti›, tá Heri Ziska skaddi sær skøvningin undir upphiting til kappingina. Tá kappingin fór í gongd kasta›i Heri ikki í teimum fyrstu umførunum. Poul Guttesen leg›i seg á odda vi› einum kasti uppá 34,37 m. Tá Heri so royndi seg í fjóra umfari misey›naist kasti› heilt, og vænta›i man tá at hann fór at gevast, men royndi seg so aftur í fimta umfari og fekk tveitt diskos út á gó›ar 38 m. Hetta var nokk til at vinna kappingina, men ærukærur sum hann er, so vildi hann royna eitt kast afturat fyri at vita um ta› ikki var møguligt at kasta útum 40 m. Ta› gekk í 6. og sí›stu royndar har hann kasta›i 42,48 m. Hetta t‡›ir uppá, at hann er stak væl fyri og um ska›in ikki hev›i komi í vegin so hev›i ver›i áhugavert at sæ› hvussu langt diskos hev›i flogi. Vónandi fer› hesin ska›in ikki at geva Hera trupulleikar, tá hann skal kappast um ta› opna íslendska meistaraheti› komandi vikuskifti›.

Í spjótkast luttóku 3 kvinnur og 7 mans. Hjá kvinnunum var ta› Randi Kúrberg, sum leg›i seg á odda vi› einum persónligum meti uppá 25,15 m, men í har›ari kapping vi› Jensiu Lamhauge. Í tri›ja umfari setti Jensia Lamhauge n‡tt føroyskt met vi› 30,49 m, og helt man tá at kappingin var um at ver›a avgjørd, men Randi svara›i aftur beinan vegin vi› at seta n‡tt persónligt met 28,17 m. Sostatt økti hon um sítt persónlig met vi› 5 m. Ta› hendi tó ikki meir í hesi annars stak spennandi kappingini. Ta› gamla meti› átti Miriam Thomassen úr Sandavági. Sostatt mistu møggurnar bá›ar eitt føroyskt met sama dag.

Hjá monnunum var kappingin stak jøvn, og ta› vóru ikki færri en 5 mans sum kasta›u meir enn 40 m. Ta› var leingi spenningur um hvør fór at fara vi› sigrinum. Poul Guttesen, Líggjas Høgnesen og Heini Hanusarson Joensen kasta›u allir millum 43 og 44 m í fyrsta umfari. Men longu í næsta umfari setti Líggjas trumf á vi› einum kasti uppá ikki minni enn 46,66 m. Sostatt var ta› mest spenningur um, hvør fór at fara vi› silvur merkjunum, og var ta› Suni Davidsen sum í fjóra umfari› kasta›i 43,68 m, sostatt fekk Poul Guttesen broncu merkjuni vi› 43,58 m. Hóast Heini bert var 56 cm frá silvurmerkjunum, so enda›i hann beint uttanfyri medaljurø›ina í síni fyrstu kapping, og má ta› sigast at ver›a eitt stak gott úrslit.

Næsta kapping innan frælsan ítrótt ver›ur komandi mikukvøld 26. juli. Tá ver›ur kappast um FM í hamarkasti og Kúlustoyti. Hendan kappingin ver›ur eisini vi› Eysturskúlan og byrjar hon kl. 18.30.

Tey endaligu úrslitini í kappingunum vóru:

Diskos kast kvinnur

1.	Ingibjørg Poulsen Føroyskt met	29,52 m
2.	Randi Kúrberg Persónligt met	19,48 m

Diskoskast menn:

1.	Heri Ziska	42,48 m
2.	Poul Guttesen Persónligt met	34,37 m
3.	Gunnbjørn Otthamar Persónligt met	19,16 m
	Jákup Andrias Thomsen Føroyskt met fyri 15-16 ár	18,84 m

Spjótkast kvinnur

1.	Jensia Lamhauge Føroyskt met	30,49 m
2.	Randi Kúrberg Persónligt met	28,17 m
3.	Ingibjørg Poulsen	14,24 m

Spjótkast menn:

1.	Líggjas Høgnesen	46,66 m
2.	Súni Davidsen	43,68 m
3.	Poul Guttesen	43,58 m
4.	Heini Hanusarson Joensen Persónligt met	43,12m
5.	Høgni Debes	40,91 m
6.	Gunbjørn Otthamar Persónligt met	28,68 m
7.	Jákup Andrias Thomsen Persónligt met	23,57 m

Ta› ber til hjá teimum smáu

Veitslurómur var í Aserbadjan, tá ta› fyri fyrstu fer› eydna›ist einum li›i hagani at koma ví›ari í europeisku kappingini

Higartil hevur ta› ongantí› eydnast einum føroyskum li›i at spæla seg ví›ari í Europa Cup. HB kom ví›ari í 1993, tá RAF Latvia, sum hev›i vunni› 1–0 á heimavølli, ikki møtti á Svangaskar›i. Men á vøllinum eiga føroysk li› framvegis fyrsta samanlagda sigurin til gó›a.

At ta› vi›hvørt eydnast hjá teimum, sum hvørja fer› plaga at tapa, vóru onkur dømi um mikukvøldi›, tá seinnu dystirnir í fyrsta innlei›andi umfarinum vóru á skránni.

Í Aserbadjan var stórur fagna›ur. Meistarali›i› hjá teimum, sum eitur FC Shamkir, megna›i at senda Skonto Riga úr Letlandi úr kappingini. Føroyingar og serliga klaksvíkingar minnast Skonto Riga. Ta› var hetta li›i›, sum í 1992 basti KÍ í Europa Cup fyri meistarar. Hetta var fyrsta ári›, at føroysk li› vóru vi› í Europa Cup (B36 spældi í kappingini fyri steypavinnarar ímóti Avenier Beggen úr Luksemburg).

Næstsí›sta mikukvøld vann Skonto Riga 2–1 á heimavølli. Hesa fer› vann FC Shamkir 2–1. Men ta› sá einki út hjá heimali›num, sum skora›i sigursmáli›, tá tríggir minuttir av eykatí› vóru farnir. So var ney›ugt vi› longdari leiktí›, og fagna›urin mundi ongan enda tiki›, tá heimali›i› skora›i tvær fer›ir afturat.

Í næsta umfarinum skal Shamkir spæla ímóti Slavia úr Prag. Li›i› úr Aserbadjan hevur ongan møguleika, men ta› tekur ikki fagna›in burtur yvir sigurin í fyrsta umfarinum. Og at tvær fer›ir eina millión krónur frá UEFA koma á eitt turt sta› í Aserbadjan man eingin ivi vera um!

Ongantí› ov gamal

Olgar Danielsen er føroyskur toppskjútti í Europa Cup. Hann hevur skora› fimm av teimum seks málunum, sum KÍ hevur fingi›. Í ár fekk KÍ einki mál í Europa Cup. Avriki› hjá Shamkir fær hugsanina fram um, at kanska hev›i ta› veri› ø›rvísi hjá KÍ, um Olgar ikki hev›i havt sett skógvarnar á hillina.

Stóri ma›urin í Aserbadjan mikukvøldi› var mi›framherjin, sum eitur so miki› sum Bakri Kvaratskheliya. Hann skora›i tr‡ tey fyrstu málini, og hann er 36 ára gamal. Hattrikki› hjá manninum, sum vit ikki orka at nevna navni› á eina fer› afturat, fær hugsanirnar at leita aftur til 1995, tá Olgar Danielsen á Svangaskar›i skora›i hattrikk ímóti Maccabi Haifa úr Ísreal!

– Hetta var vánaligasta úrsliti› í mínum fótbóltslívi›, var vi›merkingin hjá Alexander Starkus, sum er venjari hjá Skonto Riga, og ta› er væl skiljandi, at hann ikki hev›i meiri at siga.

Vónbrot og kæti

Í Nor›urírlandi var ta› um reppi›, at Linfield FC mikukvøldi› megna›i at senda finska FC Haka úr kappingini. Inntil ta› resta›u tríggir minuttir var heimali›i› á odda 2–0, men so minka›i Peter Kovacs um munin til 2–1. Tá stó› á jøvnum, men FC Haka, sum í fjør sendi HB úr Europa Cup, hev›i vunni› 1–0 á heimavølli og harvi› bjarga›i reglan um mál á útivølli teimum. FC Haka skal í næsta umfarinum spæla ímóti Inter Bratislava úr Slovakínum.

Vónbroti› var stórt í Nor›urírlandi, men rómurin var øgiligur í Estlandi. Har eydna›ist ta› mikukvøldi› fyri fyrstu fer› at fáa eitt li› ví›ari úr fyrsta innlei›andi umfarinum í Europa Cup fyri meistarali›.

FC Levadia Maardu hev›i vitjan av walisiska meistarali›num, sum tapti 4–0. Úrsliti› í Wales í sí›stu viku var 2–2. Ta› hev›i vi› sær, at walisiska li›i› noyddist at fara fram á vøllin fyri at fáa mál. Teir vóru væl vi› fyrsta hálva tíman. Ofta ver›ur nógv lagt afturat vanligu leiktí›ini. Estlendska li›i› fekk hol á, tá fimm minuttir vóru spældir eyka av 1. hálvleiki, og so smokka›i walisiska korthúsi›. Meistarali›i› úr Wales eitur Llansantffraid FC.

Gla›u menninir úr Estlandi skulu komandi mikukvøld spæla í Ukreina, har mótstø›uli›i› eitur Shaktar Donetsk.

jh

mynd: Jens K.Vang



Todi skora›i framúr mál

Fyrireikingarnar hjá FCK til n‡ggja kappingarári › enda›u vi› sigri á West Bromvich Albion

Í vikuskiftinum ver›ur fari› undir eitt n‡gg kappingarár í superliguni. FCK enda›i sínar fyrireikingar mikukvøldi›. Tá spældu teir ímóti eingilska 1. deildarli›num West Bromvich Albion úr Birmingham, sum er í Skandinavia og fyrireikar seg til n‡ggja kappingarári›.

Úrsliti› var 1–0 til FCK, og ta› var Todi Jónsson, sum skora›i einasta máli›. Sambært donsum fjølmi›lum var talan um eitt framúr mál, sum Todi skora›i vi› høgra beini. Et gudemål, ver›ur sagt. Hvat liggur í hesum n‡ggja fótbóltshugtakinum kunnu vit bara ímynda okkum, men av frágrei›ingini um máli› skilst, at talan var um eitt gott mál.

Su›urafrikanski snillingurin Sibusiso Zuma sneiddi fleiri av sær í høgru, á›renn hann leg›i heilt tvørtur um í vinstru. Har fekk Todi Jónsson bóltin, hann sneiddi ein av sær, setti kós móti málinum, og tá hann var komin á brotsteigar samankomingina smekka›i hann til vi› høgra beini, og bólturin fór dygst undir nærru samankomingini og í kassan.

Máli› kom, tá seinna umfari› var fimm minuttir gamalt.

Sambært donsku fjølmi›larnar var ta› bara í fyrsta korterinum eftir ste›gin, at ta› var serliga nógv lív í. Talan var alla tí›ina um nógvar nærdystir, men málmøguleikarnir vóru ikki so nógvir. Nakrir komu í løtuni eftir at Todi hev›i skora›, men einki spurdist burturúr.

Skeiva vegin

Venjingardysturin var› spældur á Greve stadion. Har vóru 1103 ásko›arar. Millum teirra vóru onkra sta›ni millum tvey og tr‡ hundra› vi›haldsfólk hjá WBA. Hesi komu umframt úr Danmark eisini úr Svørfiki og Noregi. At WBA eigur vi›haldsfólk í Skandinavia man stava frá tí›ini fyri einum tjúgu árum sí›ani. Tá taldist Birmingham felagi› millum tey bestu í Onglandi.

Millum spælararnar vóru Bryan Robson, sum seinni var li›forma›ur í Manchester United og á eingilska landsli›num, Larry Cunningham, sum seinni spældi vi› Real Madrid, men doy›i í fer›sluvanlukku, og so sterki og dimmi mi›framherjin Cyrille Regis.

Sí›ani tá hevur ta› ikki gingi› naka› serligt hjá WBA. Í Birmingham hava bæ›i teir og felagi›, sum eitur Birmingham, sta›i› í skugganum av Aston Villa, og solei›is er ta› framvegis.

Fleiri skiftingar

FCK droymir um at vera best í Danmark og at standa seg væl í europeisku kappingunum. Teir hava nógvar spælarar, og at n‡ggi venjarin, onglendingurin Roy Hodgson, vil hava kapping um plássini á li›num, sást í venjingardystinum í Greve.

Todi Jónsson og Sibusiso Zuma ver›a rokna›ir sum bestu bo›ini upp á ytstu mi›vallarpláss ini í 4–4–2 uppstillingini. Í 1. hálvleiki í Greve sótu teir bá›ir á beinkinum. Teir komu bá›ir á vøllin beinanvegin eftir ste›gin, og ta› setti meiri fer› í álopsspæli› hjá FCK, ver›ur sagt í donsku fjølmi›lunum.

Fyrsti landskappingardysturin hjá FCK ver›ur í Parkini sunnudagin. Tá skulu teir spæla ímóti Haderslev.

jh

Jugoslavarnir vóru fittir

Rey›a Stjørnan Beograd–KÍ 2–0 (2–0): Klaksvíkingar halda, at teirra avrik á útivølli var væl betri, enn tá teir taptu stórt á heimavølli

KÍ hevur lagt Europa Cup fyri hesa fer› afturum bak. Teir eru framvegis í Jugoslavia. Tíggju kilometrar frá ungverska markinum fyrireika teir seg til seinnu helvt av landskappingini. Í gjár høvdu teir frí, í dag venja teir, í morgin skulu teir spæla dyst, og ta› skulu teir eisini t‡sdagin. Milliónin fyri Europa Cup hesa fer› ver›ur flutt á konto í juni komandi ár. Avriki› í átta teimum sí›stu umførunum í landskappingini ver›ur avgerandi fyri, um KÍ aftur komandi ár sleppur at royna seg í Europa.

Hesa fer› var líti› at gera. Eftir at teir høvdu vunni› 3–0 á Svangaskar›i, gjørdu teir í Rey›u Stjørnu skjótt av. Altjó›a tí›indastovurnar vita at siga, at Branko Boskovic setti hol á vi› brotsparki (Zoltan Feldi ein, sum kom ímóti honum), tá ellivu minuttir vóru farnir, og seks minuttir seinni økti Goran Drulic til 2–0.

Altjó›a tí›indastovurnar halda, at talan ver›ur um eina meiri spennandi roynd hjá FK Crvena Zvezda, tá teir í næsta innlei›andi umfarinum skulu spæla ímóti georgiska meistarali›num Torpedo Kutaisi.

Høvdu bóltin meiri

Eftir loki› strí› koyrdu klaksvíkingarnir beinanvegin teir tveir tímarnar nor›ur til Subotica. Í b‡num búgva umlei› 250 túsund fólk.

– Vit eru betri nøgdir vi› avriki› hesa fer›, enn tá vit spældu ímóti teimum á Toftum. Tá vóru ta› ov nógvir, sum tordu ov illa at hava bóltin. Venjarin ba› okkum halda upp á bóltin, og ta› eydna›ist væl betur hesa fer›. At vit spældu 4–5–1 gjørdi, at vit fingu meiri breidd í, tá vit høvdu bóltin. Vit høvdu ikki nógvar møguleikar, men Marek hev›i eina gó›a frísparksroynd, og eina a›ra fer›ina var eisini um reppi›, at hann fekk mál, sigur Harley Bertholdsen úr Jugoslavia.

Á onkrum í fer›alagnum, sum ikki spældi vi›, skilja vit, at KÍ hesa fer› spældi vi› flatari verju, og at ta› rigga›i væl. Ove Nysted var í mi›verjuni saman vi› Jan Andreasen. Andrzej Pacek var avsettur hesa fer›.

Rógvi Jacobsen, sum var› útskiftur í fyrra dystinum, var einsamallur í álopinum. Hann arbeiddi sum ein hestur, og hann var væl vi› í samanspælinum, men ta› var torført at sleppa framat til møguleikar.

– Teir tíggju túsund ásko›ararnir vóru ikki nøgdir vi› heimali›i›. Ta› var t‡›uligt, at tey rokna›u vi› nógvum málum og stórsigri. Rey›a Stjørnan leg›i bragdliga fyri bæ›i í 1. og í 2. hálvleiki, men teir dovna›u skjótt, og ta› góvu ásko›ararnir t‡›uliga til kennar, at tey ikki vóru nøgd vi›. Í 2. hálvleiki høvdu tey hug at taka á vi› KÍ, sum var væl vi› í spælinum, siga klaksvíkingarnir í Jugoslavia.

Hjalgrím Elttør spældi seinna partin av 1. hálvleiki. Hetta var fyrsta royndin hjá honum í Europa Cup. Merkisvert er eisini, at Allan Joensen, sum orsaka av ska›a ikki hevur spælt á hægsta stø›i í tvey ár, sí›stu løtuna avloysti beiggja sín, Jan Joensen, sum er li›forma›ur hjá KÍ og sum aftur hesa fer› var› sagdur at vera ein tann besti á KÍ li›num. Marek stó› eisini sterkur í myndini.

Li›i› hjá KÍ sá solei›is út: Zoltan Kujundric – Harley Bertholdsen, Ove Nysted, Jan Andreasen, Niclas Niclasen – Arnold Joensen (Srecko Milicevic, 46.), Kristian á Lakjuni, Jan Joensen (Allan Joensen, 85.), Marek Wierzbicki, He›in á Lakjuni (Hjalgrím Elttør, 71.) – Rógvi Jacobsen.

Jugoslaviska li›i› spældi vi› umlei› somu manning, sum teir gjørdu á Svangaskar›i. Ein n‡ggjur vongspælari var vi›, og ein av mi›verjunum á Føroya fer›ini sat uttanfyri. Einki sást til teir, sum fyrr í summar tóku lut í EM endaspælinum.

Stórur áhugi

Eingin ivi er um, at jugoslavisk li› hava einki at gera í fyrsta innlei›andi umfarinum í Europa Cup. Ta› eru tey alt ov gó› til. At Rey›a Stjørna longu nú noyddist at vísa, hvør dugur er í teimum kemst av, at Jugoslavia orsaka av innanh‡sis kríngum hevur veri› útiloka› frá øllum altjó›a fótbólti og tískil skal spæla seg upp.

Pressuáhuganum bilti einki, sjálvt um ta› í gásareygum bara var KÍ, sum vitja›i. Ta› var› skipa› fyri tí›indafundum t‡sdagin og mikudagin. Har vóru bæ›i elektroniskir fjølmi›lar og nógv blø› umbo›a›. Jan Joensen var vi› Tomislav Sivic á fundunum, og tí›indamenninir vóru sera áhuga›ir í jugoslavanum, sum er venjari mitt úti á Atlantshavninum.

T‡sdagin var KÍ fer›alagi› og hugdi seg um í Beograd. Sárini frá kríngum eru framvegis ógvuslig. Klaksvíkingarnir løgdu til merkis, hvussu neyvir teir í NATO høvdu veri›, tá teir bumba›u. Ta› vóru ávísir bygningar, sum høvdu fingi› stóran ska›a, me›an ta›, sum er rundanum, stendur óskala›, siga klaksvíkingarnir í Jugoslavia. Øll í fer›alagnum hava ta› gott. KÍ ver›ur aftur í Føroyum hósdagin 27. juli.

jh

KR skal spæla ímóti Brøndby

Íslendska meistarali›i› sendi mikukvøldi› meistarali›i› av Malta úr europeisku kappingini

Ta› ver›ur ein uppger› millum eitt danskt og eitt íslendskt li›, tá ta› mikukvøldi› í komandi viku ver›ur fari› undir anna› innlei›andi umfari› í Europa Cup fyri meistarali›. Hetta var› greitt mikukvøldi›, tá íslendska meistarali›i›, KR, megna›i at spæla seg ví›ari úr fyrsta innlei›andi umfarinum.

KR spældi ímóti Birkirkari av Malta. Í fyrru royndini, sum var á Malta, vann KR 2–1. Mikukvøldi› vóru mi›alhavsmenninir í Reykjavík. Uppger›in var á Laugardalsvøllinum, og KR vann 4–1. Ta› vil siga, at teir vunnu samanlagt 6–2.

Brøndby var næstbest í superliguni sí›sta kappingarár. Teir hava tískil høvi at royna seg í innlei›andi umfarinum í meistarakappingini. Teir vóru ikki vi› í fyrsta innlei›andi umfarinum, men nú skulu teir upp í part, og luturin fall solei›is fyrr í hesum mána›inum, at Brøndby skuldi spæla ímóti vinnaranum millum KR og li›i› av Malta.

Fyrra uppger›in ver›ur í Brøndby komandi mikukvøld.

Jákup Mikkelsen og Herfølge skulu eisini royna seg í europeisku meistarakappingini. Hvørjum teir skuli spæla ímóti í tri›ja og sí›sta innlei›andi umfarinum, á›renn ta› ver›ur fari› undir bólkaumfari›, har nógvar milliónir eru at vinna, fæst at vita í dag. Lutakasti› ver›ur á middegi.

Jákup og teir vita, at talan ver›ur um eitt sera gott mótstø›uli›. Vit kunnu vóna, at talan eisini ver›ur um eitt áhugavert mótstø›uli›. Ta› vil vi› ø›rum or›um siga, at teir sleppa frá at fara eystureftir og í sta›in sleppa at royna seg ímóti einum italskum, sponskum ella kanska fronskum li›i.

jh